# Nú er øðrvísi

**VODAFONEDEILDIN**

**EB/Streymur var trý stig frá at vinna føroyameistaraheitið í fjør. Orsøkin var keðiliga byrjanin. Úrtøkan var bara seks stig eftir fyrstu seks landskappingardystirnar. Í ár er øðrvísi**

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| EB/Streymur | 2 |
| Víkingur | 1 |




*Í fjør var heldur slaka byrjanin upp á kappingarárið hjá sundalagsmenn orsøkin, at teir vóru ov stuttir til FM, men við sigrinum á FM kandidatinum úr Víkingi leygardagin, tykjast teir blá/svørtu at vera væl fyri frá byrjan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Heðin Askham hevur ikki lagt fyrireikingarnar til kappingarárið í ár øðrvísi tilrættis. Høvuðsmunurin er, at tveir av lykilspælarunum hava spælt við fullari megi.

Daniel Udsen og Arnbjørn Hansen vóru illa darvaðir av skaðum fyrstu vikurnar í fjør. Teir eru væl fyri í ár, undantikið um vikuskiftið, tá Arnbjørn Hansen bara spældi seinastu fimm minuttirnar. Hann hevur verið sjúkur í vikuni.

Daniel Udsen hevur greiða støðu.

– Vit eru væl fyri, og skaðarnir hava ikki rakt eins meint í ár sum í fjør, sigur hann.

Nú skal eingin gera ov skjótt av. Framvegis eru fáir dystir spældir, og støðan kann broytast skjótt. Tað broytir hinvegin ikki, at EB/Streymur hevur vunnið Klaksvíkskappingina, stórsteypadystin, víðari luttøku í steypakappingini og fyrsta landskappingardystin.

### FM-biðlarnir

EB/Streymur og Víkingur eru einastu feløgini, sum hava sagt alment, at greiði málsetningurin er at vinna gull. Ein útsøgn, sum verandi føroyameistararnir taka frástøðu frá.

– Eg vildi ynskt, at vit kundu melda greitt út eins og Víkingur og siga, at vit skulu vinna FM. Men tað kunnu vit rætt og slætt ikki, segði Julian Hansen, venjari hjá HB, í fótbóltsblaðnum hjá Miðlahúsinum. Spurningurin er so, um hann ikki vil leggja trýst á sínar spælarar.

EB/Streymur og Víkingur tykjast vera sera væl fyri. At tveir FM-biðlar brustu saman við Margáir um vikuskiftið, var tað eingin sum setti spurnartekin við.

### Lítið spæl

Hvørki av liðunum fingu ferð á spælið hesaferð. Bólturin ferðaðist nógv millum leikhálvurnar, og tað ráddi fremst av øllum um at vinna nærdystirnar.

Tað ger Levi Hanssen, EB/Streymur, greitt.

– Vindurin darvaði spælinum somikið, at bólturin var nógv í miðkringinum. Har royndu vit at vinna nærdystirnar, og tíbetur endaðu vit omaná, sigur hann.

Levi Hanssen legði heimaliðið á odda. Pætur Dam Jacobsen fór inn í brotsteigin og sendi bóltin fyri føturnar á Hanssen, sum var avgjørdur. Tá vóru 20 minuttir spældir.

Hans Jørgen Djurhuus javnaði fyri gestirnar fýra minuttir seinni. Hann stóð væl fyri í brotsteiginum, tá hann smekkaði til.

Alex José dos Santos skeyt sigursmálið við brotssparki, tá tveir minuttir restaðu í av fyrra hálvleiki.

### Uppiborin sigur

Víkingur var sjálvsagt leikliga omaná seinastu løtuna av dystinum. EB/Streymur vildi verja leiðsluna, meðan gestirnir dyrgdu eftir einum stigi. Tað var hinvegin sjáldan, at Víkingur setti René Torgarð, sum vardi málið hjá heimaliðnum, undir trýst. Tað nærmasta var eitt innlegg, tá bólturin fór við vindinum og brádliga skifti kós. Vindurin snýtti málverjan, men Torgarð var knappur og loftaði bóltinum.

Daniel Udsen heldur, at sigurin var uppiborin.

– Víkingur er nógv á bóltinum eftir steðgin, men eg haldi ikki, at teir eru nær við at fáa mál. Vit hava tamarhald á støðuni, sigur Udsen

*uni@sosialurin.fo*

## *SMS-boð um dystin:*

*»DAGfinn var DAGsins madur vid Margáir – Hollywood brotsspark«*

*»Bodil UDSEN vard eisini sjónleikari !«*

*»Tad er munur á at lata seg detta, og at detta ordiligt heim til mammu.
Heilsan ein víkingur.«*

## Eg spældi upp á tað

**Víkingur mótmælti harðliga avgerðina, tá Dagfinn Forná, dómari, bríkslaði fyri brotssparki til EB/Streym. Ikki talan um brotsspark, var niðurstøðan hjá gestunum.**

**Daniel Udsen fekk bóltin á hálvuni hjá Víkingi. Landsliðsleikarin fór til stroks, sneiddi tríggjar mótstøðumenn av og kom inn í brotsteigin. Tá fór hann brádliga um koll.**

**– Eg spæli eitt sindur upp á tað, men tað er eingin ivi um, at tað var brotsspark. Hann legði fót fyri mær, og eg var steðgaður ólógliga, sigur Daniel Udsen.**

**Hann var millum teir mest eyðsýndu hjá EB/Streymi.**

# Arnbjørn eigur plássið

**Levi Hanssen var fremsti maður hjá EB/Streymi í gjár. – Tað gekk væl, men Arnbjørn Hansen eigur hatta plássið, sigur málskjúttin**

Uni Holm Johannesen

Heðin Askham hevði ein trupulleika, tá hann skuldi seta liðið hesaferð. Eingin framherji var nóg byrgdur at spæla frá byrjan. Arnbjørn Hansen hevur verið sjúkur í vikuni og spældi bara seinastu fimm minuttirnar. Sorin Anghel var ikki við vegna skaða. Tað kom ikk upp á tal at flyta garvaða Egil á Bø sum fremsta mann. Hann hevur nógvar royndir sum framherji, men stýrir vanliga verjupartinum við hepnari hond.

Loysnin var Levi Hanssen. Seinast havnarmaðurin spældi sum framherji var í 2005, tá hann umboðaði B36.

– Tað gekk væl, og eg var so heppin at fáa eitt mál. Eg vænti hinvegin ikki at spæla har fleiri ferðir í ár, tí Arnbjørn Hansen eigur hatta plássið, sigur Levi Hanssen.

Tað skal einki takast frá avrikinum hjá honum. Sum einstaklingur hevur hann ikki somu eginleikar sum Arnbjørn, men Levi stríddist ómetaliga væl.

Daniel Udsen heldur, at Heðin Askham valdi rætt.

– Levi kom væl frá uppgávuni. Hann er raskur og treiskast eftir bóltinum í samfullar 90 minuttir, sigur Daniel Udsen.

*uni@sosialurin.fo*